# Jákup aftur við á aldukambinum

**Í Molde miðja teir nú ímóti at sleppa upp í part í Europa Cup**

NOREG
*Jóannes Hansen*



*Jákup Mikkelsen var aftur á liðnum, tá Molde um vikuskiftið vann stórsigur á Odd Greenland*

Eins deyð er annars breyð, sigur orðatakið. Onga staðni man hetta vera meiri beinrakið, enn tað er í fótbólti. Tað fekk Jákup Mikkelsen at sanna, tá hann eftir landsliðsferðina í Føroyum kom aftur til Molde. Tá hann kom aftur av væl eydnaðu ferðini í Jugoslavia, varð hann settur av besta liðnum. Tí hevði hann ikki roknað við so nógvum, tá hann hósdagin kom aftur til Molde, men tá vóru viðurskiftini broytt.

Knut Lillebakk, sum fyrr í summar vann plássið frá Jákupi, hevur ein ikki serliga sterkan rygg – heilt bókstaviliga meint. Meðan Jákup var í Føroyum varð hin málverjin skaddur undir venjing. Hann hevur ikki vant seinastu vikuna, og hann fer ikki at venja aftur fyrrenn í fyrsta lagið hósdagin í hesi vikuni.

Skaðin hjá kappingarneytanum hevði við sær, at Jákup Mikkelsen var á besta Molde liðnum, tá teir sunnudagin høvdu vitjan av Odd Greenland, og lítil ivi man vera um, at hann verður aftur millum stólparnar, tá teir komandi sunnudag fara at spæla á útivølli ímóti Lyn, sum brúkar tjóðarleikvøllin Ullevaal.

## Á kambinum

Molde vann 6–1 sunnudagin. Hetta var størsti sigurin hjá teimum í eitt ár, og svenski venjarin, Gunde Bengtsson, hinir í Molde og norska pressan vóru samd í, at talan var um so nógv tað besta avrikið hjá liðnum í hesum kappingarárinum.

– Nú miðja vit eftir fjórða plássinum, sum ber atgongd til Europa Cup við sær, siga teir í Molde, og málið er ikki so langt burtur, men tað verður ikki lætt. Molde skal spæla ímóti fýra av hinum liðunum, sum eru við í oddastríðnum. 10. oktober skulu teir spæla á heimavølli ímóti Brann úr Bergen, sum í løtuni er á fjórða plássinum. Tað verður ein sera avgerandi dystur. Um Jákup Mikkelsen fer at verja málið ta ferðina – tað verður beint aftaná landsliðsferðina til Slovenia – veldst um, hvussu føroyski landsliðsmálverjin fer at standa seg í landskappingardystunum.

Fimm tær seinastu ferðirnar hevur Molde skorað tjúgu mál, og teir hava fingið tólv stig. Tá tað gongur so væl, verður ikki hugt so nógv eftir málverjanum, sum ikki hevur so nógv at gera.

## Miðal ummæli

Í VG fekk Jákup í gjár saman við fleiri av liðfeløgunum eitt fimm tal. Besti maðurin fekk sjey, onkrir fingu seks, og onkrir fingu fýra.

Molde var frammanfyri 1–0 í 1. hálvleiki, og beinanvegin eftir steðgin øktu teir til 2–0. Lítla løtu seinni minkaði Odd Greenland um munin. Ein av verjumonnunum tamdi bóltin til ein av mótstøðumonnunum, sum um brotssparksplettin smekkaði flatt millum tveir verjuspælarar og í málið. Jákup tveitti seg, men tað var eingin møguleiki at bjarga. Í 1. hálvleiki høvdu gestirnir eina skotroynd. Jákup tók sær trygt av onkrum innleggum, og so vísti hann enn eina ferð gott fótbóltsspæl, tá viðspælararnir løgdu aftur.

– Tað var hugaligt aftur at sleppa upp í part á besta liðnum, serliga tá tað nú gongst so væl, sigur Jákup Mikkelsen, sum ikki veit, hvussu tað verður, tá sáttmálaskeiðið verður liðugt seinni í heyst.

– Í løtuni savni eg hugsanirnar um at fáa spælið at ganga, so fáa vit seinni í heyst at síggja, hvussu tað verður við sáttmála spurninginum.

## Gott ummæli

Norsku fjølmiðlarnir vóru í gjár mest upptiknir av, at tað var val til stórtingið. Men saman við øllum politiska tosinum staðfestu teir, at Molde sunnudagin hevði staðið fyri besta fótbóltsavrikinum sunnudagin.

Síðsta hálva tíman skoraði Molde fýra mál. Íslendingurin Andri Sigthórsson staðfesti til 6–1. Tá restaðu tveir minuttir, og nýggi fremmanda maðurin hevði bara verið á vøllinum í tríggjar minuttir, tá hann fyrstu ferð skoraði. Tá reistu teir 5.083 áskoðararnir seg og góvu við lógvabrestur til kennar, at teir vóru heilt væl nøgdir.

Kemilux industri P/F, sum varð stovnað í 1965, er ein fyritøka í menning. Fyritøkan framleiðir sápuúrdráttir og umboðar harumframt ymiska reingerðarútgerð og kemisk evnir og hevur 11 fólk í starvi. Felagið, ið selir vørur innanlanda og uttanlanda, arbeiðir í løtuni við at menna søluna á heimamarknaðinum og søkir í tí sambandi eftir

**Sølufólki**

at byrja **1. oktober 2001**.

Starvið, ið er eitt fulltíðarstarv, verður fyribils sett fyri eitt hálvt ár, ið verður at roknað sum ein royndartíð. Starvið er fjølbroytt og avbjóðandi og snýr seg í høvuðsheitum at selja okkara vørur til heimamarknaðin t.v.s. skip, bátar, virkir og stovnar runt um í landinum.

Tú kemur saman við sølustjóranum og øðrum sølufólki at leggja arbeiði til rættis, soleiðis at okkara vælvirkandi søludeild kann mennast.

**Førleikakrøv:**
Vit vænta at tú hevur royndir innan søluarbeiði og at tú dugir at nýta tey mest vanligu telduforritini. Sum persónur vænta vit at tú ert ágrýtin og dugur at arbeiða sjálvstøðugt, og at tú hevur góð samstarvsevnir.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi **innan 24. september 2001**, og verða at senda til:

KEMILUX® industri

Mykinesgøta 1
Box 1231
FO 110 Tórshavn

# Óli sá reytt

**Felagið hjá Øssuri Hansen søplaði síðstu løtuna sigurin burtur**

DANMARK
*Jóannes Hansen*




Tað var sunnudagin eitt sindur upp og niður hjá føroysku landsliðsmonnunum í næstbesta donsku deildini.

Óli Johannesen og Hvidovre høvdu vitjan av botnliðnum B 1909 úr Odense. Hvidovre vann 2–0. Teir skoraðu í 34. og í 63. minutti. Komandi sunnudag skulu teir spæla á útivølli ímóti felagnum hjá Atla Gregersen, Randers Freja, men tá verður Óli Johannesen ikki við. Tá tað restaðu tólv minuttir sunnudagin fekk hann reyða kortið. Hetta var fyrsta reyða kortið, síðani hann kom til felagið hjá Peter Schmeichel, sum fyri fyrstu ferð í hesum kappingarárinum lyfti seg upp úr botninum.

Øssur Hansen var á B93 liðnum ímóti Randers Freja. Alt tóktist skulu ganga, sum tað frammanundan var roknað við. B93 setti hol á í 44. minutti, og í 61. minutti øktu teir til 2–0. Men so vendi tað. Tað restaðu sekstan minuttir, tá Randers Freja minkaði um munin, teir javnaðu níggju minuttir undan leikloki, og í síðsta minuttinum skoraðu teir sigursmálið.

Øssur Hansen var á B93 liðnum inntil støðan var 2–1.

– Eg kendi meg troyttan í beinunum eftir landsdystin mikukvøldið. Frammanundan hevði eg avtalað við venjaran, at tað kanska fór at vera neyðugt at fara av vøllinum, men eg hevði avgjørt ikki roknað við, at vit fóra at tapa.

Hetta sigur Øssur Hansen úr Keypmannahavn. Um orsøkina til tapið sigur hann, at tað kom panikkur í, tá mótstøðuliðið minkaði um munin og sigurin, sum tóktist vera tryggur var eitt sindur hóttur.

Synd er at siga, at føroyska landsliðsmenninir í næstbestu donsku deildini spæla fyri nógvum áskoðarum. Í Hvidovre møttu 558 upp, og á Etysturbrúgv vóru 310 og hugdu at B93. Í báðum førum var talan um færri áskoðarar, enn tað eru til nógvar dystir í bestu deildini í Føroyum.



B71-HB 3-2 (2-1):

# Eli fleiri ferðir runt um seg sjálvan

**Sandoyingar lyftu seg sjálvar av aftasta plássinum, tá HB fyri fimtu ferð fór av vøllinum uttan at hava vunnið**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*



*Hesa ferð eydnaðist tað endiliga hjá B71 at vinna ein dyst, og meðan teir við hesum lyftu sær av niðasta plássinum, tykist kreppan í HB ongan enda at taka*
*Mynd: Emil Simonsen*

Lagið var gott á Sandi sunnudagin. Eftir at fótbóltsliðið hjá teimum ikki hevði fingið stig, síðani teir í síðsta umfarinum undan summarsteðginum – tað var 7. juli – vunnu 2–1 á Eiði, megnaðu teir at fáa fulla úrtøku. Og tað smakkaði teimum ikki minni væl, at tað var ímóti stórfelagnum úr høvuðsstaðnum, at teir fingu fulla úrtøku.

## Dysturin í tølum:

**B71-HB 3-2 (2-1)**

**1-0:** Kári Reynheim 20
**2-0:** Eli Hentze (br.) 28
**2-1:** Bárður Mortansson (br.) 44
**2-2:** Gunnar Mohr 50
**3-2:** Eli Hentze 88

**B71:** Valdemar Nowisci – Jógvan Jón Petersen, Bernhard Petersen, Bjørn Thorsteinsson – Svenning W. Hansen, Kári Nielsen, Jón Brekku, Eli Hentze, Sverrir Kjærbo – Símun Hansen, Kári Reynheim

**HB:** Pól N. Joensen – Eyðfinn Fjalsbak, Bjarni Jørgensen, Jón Rói Jacobsen, Bárður Christiansen – Hallur Danielsen, Rúni Nolsøe, Rógvi Jacobsen, Ingi Rasmussen – Bárður Mortansson, Gunnar Mohr

Men tað var um reppið, at tað gekk, sum sandoyingar so ofta hava sagt, at tað hevur tørnað út. Eftir at teir høvdu verið frammanfyri 2–0, megnaði HB at koma afturíaftur og at javna. Og tá tað bara var ein lítil løta eftir, fingu teir í HB bóltin í málið til tað, sum teir hildu vera sigursmálið. Tað var innskifti Eyðun Samuelsen, sum átti síðsta fótin á og aftaná fegnaðist saman við liðfeløgunum og teimum 20–30 trúgvu HB viðhaldsfólkunum, sum vóru við á Sandi.

Men linjuverjin hevði flaggið á lofti, og dómarin tók til eftirtektar, at talan var um rangstøðu, og so kolldømdu teir málið, meðan HB menninir vóru spinnandi illir og kendu seg burturdømdar. Ivaleyst mundi orsøkin vera henda støðan til, at Bárður Mortansson stutt undan leikloki fekk reyða kortið.

Bara lítla løtu eftir, at teir vórðu kolldømdir fyri rangstøðu noyddust HB menninir at staðfesta, at nú eru tað teir, sum hava leiklutin, ið oftast er tann hjá illa staddum liðum. Eftir B71 álop í høgru, innlegg og eitt sindur av afturi og fram setti Eli Hentze krúllin undir bóltin, og so vóru tað sandoyingarnir, sum savnaðust at fegnast um sigursmálið, eftir at málskjúttin og veteranurin í myllulíki – sum so mangan áður tey seinastu tólv árini – hevði verið runt um seg sjálvan.

– Tað lættnaði nógv hjá okkum. Um vit megna at bjarga okkum og sleppa undan niðurflyting, er nú upp til okkum sjálvar, men allar súðir eru ikki syftar enn, heldur Eli Hentze, sum hesa ferð var á framrættaða miðvallarplássi, har hann hevði Kára Nielsen undir liðini. Í høgra borði var Svenning W. Hansen, Sverrir Kjærbo var í vinstru, og Jón Brekku hevði verjukendasta miðvallarplássið.

## Gummibeinini

HB fyrstu løtuna á Sandi var langt frá útgávuni av tí HB liðnum, sum nógvu tey seinastu árini hevur verið við í kappingini um FM heitið.

Hesa ferð høvdu teir í neyðini gravað tríggjar veteranar framaftur: Ingi Rasmussen og Gunnar Mohr vóru ímillum teir fyrstu ellivu, og Eyðun Samuelsen var á beinkinum. Saman við fýra unglingaspælarum og royndum monnum á miðvøllinum komu teir ikki væl frá fyrra umfarinum.

B71 skoraði tvey mál, og fyrsta hálva tíman var HB um ein háls. Í fyrra førinum spældi Kári Reynheim út í høgru, Eli Hentze legði flatt innfyri, og spælandi venjarin og fyrrverandi HB maðurin varð skrásettur sum málskjútti.

Í seinna førinum skoraði B71 upp á brotsspark, sum varð dømt fyri hond á bóltinum.

– Fyrsta hálva tíman høvdu vit tveir aðrar púra upplagdar møguleikar, sum vit misnýttu. Eftir at vit vóru komnir framum 2–0, gekk tað, sum vit so ofta áður hava upplivað. Spælið gjørdist eyðkent av ógreiðuum, um vit nú skuldu verja leiðsluna, ella um vit skuldu halda á við tí, ið hevði givið so góða úrtøku, og so kom HB meiri við, greiðir tvey mála skjúttin Eli Hentze frá.

Dygst undan steðginum minkaði HB um munin. Eftir innlegg úr høgru fór B71 verjan eitt sindur skeiv, og Bjørn Thorsteinsson royndi at taka bóltin við vær við arminum, men tað gekk dómarin ikki við til.

Bárður Mortansson umsetti úr ellivu metrum, og fimm minuttir eftir steðgin var Gunnar Mohr upp á spæl. Eftir innlegg úr høgru var hann fyrstur á við nærra stólpan og setti krúllin undir bóltin. Og fleiri aðrar ferðirnar noyddist Valdemar Nowisci í B71 málinum at minna um, at hann framvegis er ein góður málverji, sjálvt um hann er 40 ára gamal.

– Eftir at teir høvdu javnað, haldi eg, at vit aftur fingu meiri futt í galosjurnar, sjálvt um teir høvdu bóltin nógv. Undir øllum umstøðum eru vit sera fegnir um, at tað eydnaðist okkum at fáa øll stigini, staðfestir Eli Hentze.

## Stór kreppa

Munurin á liðunum var ikki so stórur, sum hann átti at havt verið, um HB hevði livað upp til tað, sum tað verður roknað við – bæði í og uttanfyri felagið. HB er í djúpari kreppu.

Ungu menninir hava ikki tyngdina, sum skal til fyri at venda gongdini, og royndu menninir á miðvøllinum eru bara skuggar av tí, sum áður hevur borið nógvar sigrar og skreyt við sær. At tað gongur av skriðuni hevur sjálvandi við sær, at sjálvsálitið og spæligleðin eru lítil.

Nú er langt millum góðu løturnar. HB hevur ikki vunnið, síðani teir vóru í Vágum, og soleiðis sum tað hevur tørnað út síðani summarsteðgin, so skulu teir vera glaðir um, at tað fyrrapartin av árinum eydnaðist at skava ikki so lítið av stigum saman.

HB-TB 0-4 (0-3)

# TB tjóvstartaði

**Áðrenn HB'arnir høvdu funnið seg til rættis á vøllinum, høvdu tvørámenn skorað tríggjar ferðir, og so var alt avgjørt**

2. DEILD
*Jákup Mørk*

Tvørámenn gjørdu skjótt av, tá teir um vikuskiftið vitjaðu hjá HB. Sum nevnt aðra staðni, so hevði HB tikið fleiri av royndu leikarunum úr 2. deild upp á besta liðið, og hetta gjørdi sjálvandi fleiri umskipanir neyðugar hjá teimum næst bestu.

Tvørámenn høvdu tó ongan hug at lata mótstøðumenninr finna seg til rættist, men gjørdu ístaðin skjótt av, tá HB var sera illa skipað fyrstu løtuna.

Fyrst var tað Bárður Dimon, sum streyk ígjøgnum í høgru síðu, áðrenn hann sendi innfyri til Sasja Radosavljevic, og løtu seinni vóru leiklutirnir býttir um, tá Sasja sendi inn til Bárð, eftir at hava snarað fleiri mótstøðumenn av sær.

Triðja málið kom eftir hornaspark, tá Magni Petersen var hægstur, og so var alt at kalla avgjørt. Eftir hetta settu gestirnir ferðina nakað niður, men teir høvdu koritni fult tamarhald á seinastu fimm korterini.

Heldur enn at HB kundi minkað um munin, átti TB at økt, og í øllum førum trutu møguleikarnir til hetta ikki. Hin størsta mundi Zoran Mancic fáa í seinna hálvleiki, men úr 11 metrum misnýtti hann brotsspark Zoran fekk tó sett eitt punkutm fyri dystinum, tá hann í seinna hálvleki hevði seinasta fótin á TB-uppspæli, og so var trivaligi sigurin fingin til høldar.

Við sigrinum vann TB seg upp á næst fremsta plássið, og við dystum móti LÍF á heimavølli og Sumba á útivølli tykist tað nú ikki heilt ógjørligt hjá teimum at vinna seg longur upp, so ivaleyst vóna tey á Tvøroyri, at oddadysturin millum ÍF og Skála komandi vikuskifti ikki fær nakran vinnara.

**HB-TB 0-4 (0-3)**

**0-1:** Sasja Radosavljevic,
**0-2:** Bárður Dimon
**0-3:** Magni Petersen
**0-4:** Zoran Mancic